Ársfrágreiðing

2015

um

seyðahaldið í Heygshaga

Hans Martin Andreassen

Veðragjólingur
1. virðisløn
Thorvald Lútzen
Syðradalshagi

Frágreiðing 2015 um seyðahaldið í Heygshaga:

Tá ið ein skal skriva eina ársfrágreiðing, og ein ikki broytir nakað serligt,verður tað altíð ein endurtøka av tí mynstri, ið var árið frammanundan.
2015 fer í søgubøkurnar sum eitt av teimum heilt vánaligu seyðaárunum.
Eitt sera vánaligt vár við nógvum kava og nógvum regni. Lembingarveðrið var av tí ringasta. Fleiri dagar við stormi og vátaslettingi. Hetta gjørdi sjálvsagt, at færri lomb komu undan enn í 2014. Eitt var, at várið var vánaligt, men tá ið tað eisini bleiv við at vera kalt langt út á summarið, kom gróðurin eisini alt ov seint.
Hetta sást aftur á heystardegi, við tað at skurðurin var 2,74 pund lakari enn í 2014. Tað, ið gjørdi tann heilt stóra munin, vóru tvílembulombini. Hesi vigaðu 3,7 pund minni enn í 2014.
Tað, ið hjálpti eitt sindur upp á støðuna, var, at frá hálvum august og meginpartin av september var gott veður.
Árið byrjaði við at taka veðragjólingar inn, og varð hetta gjørt tann 12. januar.
Vit fingu allar aftur.

Geving - hoyggj:

Av tí at tað vóru nógvir kavadagar í januar og februar, góvu vit tí seyðinum, ið ikki hevur atgongd til bø, hoyggj.
Gjólingarnir vórðu tiknir inn, tá ið vit høvdu skannað. Teir vóru inni í 3 vikur, og hesa tíðina fingu teir hoyggj. Hetta var gjørt fyri at venja teir við hoyggj.

Geving - kraftfóður:

Allur seyðurin í haganum varð fóðraður við seyðafóðri. Vit byrjaðu at geva 16. mars.

Sunnasta Gonga og Miðjan:

Byrjað varð at geva tann 16. mars, og fingu ærnar uml. 300 g um dagin fram til 30. mars. Vit vóru á fjalli og góvu heilivág tann 30. mars.
Allur seyðurin varð viðgjørdur og vigaður. Sproytað varð við Noromectin fyri orm og lús, Covexin fyri lambablóðsótt og varð Crovect sproytað eftir rygginum fyri lús.
Tá ið fjallið var liðugt, vórðu 18 tvílembur sleptar oman um landsvegin. Hesar fingu 600 g pr. seyð um dagin frá 31. mars til 14. apríl. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær 900 g pr. seyð um dagin.
Allur hin seyðurin í haganum varð fóðraður líka, og fekk hann 370 g pr. seyð um dagin frá 31. mars til 14 apríl. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær 500 g pr. seyð um dagin.
Einlemburnar og tvílemburnar, ið gingu saman, fingu 26 kg pr. ær fyri alt tíðarskeiðið. Tvílemburnar, ið gingu fyri seg, fingu 40 kg pr. ær fyri alt tíðarskeiðið
Vit góvust at geva tann 26. mai og róku seyðin av bønum tann 26. mai.

Svartá: Byrjað varð at geva tann 16. mars. Frá 16. mars til 30. mars fingu ærnar uml. 300 g pr. seyð um dagin. Frá 31. mars til 14. apríl fingu tær 370 g pr. seyð um dagin. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær uml. 500 g pr. seyð um dagin.

Hvilvt: Vit byrjaðu at geva tann 16. mars. Frá 16. mars til 30. mars fingu ærnar uml. 300 g pr. seyð um dagin og frá 31. mars til 14. apríl 370 g pr. seyð um dagin. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær 500 g pr. seyð um dagin.

Fjalldagar:



Fyrsti fjalldagur: Róku allan seyðin inn á Støðina tann 10. februar.

Manning: Ólavur av Steinum og Hans Martin Andreassen.

Annar fjalldagur: Skannaðu allan seyðin tann 11. februar. Skanningin vísti, at vit kundu vænta okkum 31 tvílembur av teimum 180 ónum.

Ein samandráttur av skrásetingunum hesaferð er vístur í talvunum niðanfyri. Av 180 óm eru 174 kvidnar, harav 31 ganga við tveimum lombum. Av teimum geldu eru 2 gjólingar og 4 ær. Miðalvektin á ónum var:

Vekt á óm 11. februar 2015

	2015	2014	2013
Sunnasta	**41,9 kg**	**40,7 kg**	**44,5 kg**
Miðjan	**44,5 kg**	**41,5 kg**	**43,3 kg**
Svartá	**43,7 kg**	**41,4 kg**	**46,9 kg**
Hvilvt	**44,6 kg**	**43,3 kg**	**43,4 kg**

Sjálvt um tað var nógvur kavi í januar og februar, so vóru ærnar betri fyri í ár enn í 2014.

Í øðrum londum er vanligt at skanna ærnar. Endamálið er at fáa eitt gott grundarlag undir gevingini, tá farast skal undir at geva ískoytisfóður. Tá er gott at vita, um ærnar eru kvidnar ella ikki, og um tær hava eitt ella tvey lomb, tí fóðurtørvurin til hesar tríggjar bólkarnar er so ymiskur.

Úrslit av skanningini tann 11. februar 2015 á Búnaðarstovuni

Gonga	Tvílembur	Einlembur	Geldar	Í alt
Sunnasta	11	36	4	51
Miðjan	7	42	1	50
Svartá	9	44	1	54
Hvilvt	4	21	0	25
Samlað	31	143	6	180

Manning: Ólavur av Steinum, Rólvur Djurhuus, Ari Johanneson, Bjørn Patursson og Hans Martin Andreassen. Eyðstein Jensen skannaði.

<u>Triði fjalldagur:</u> Tann 30. mars róku vit allan seyðin inn á Støðina

Vektir á óm 31. mars 2015

	2015	2014
Sunnasta	**40,0 kg**	**43,5 kg**
Miðjan	**43,5 kg**	**43,9 kg**
Svartá	**43,1 kg**	**42,2 kg**
Hvilvt	**43,7 kg**	**42,1 kg**
Miðal fyri hagan	**42,4 kg**	**43,0 kg**



Manning: Ólavur av Steinum, Zakarias Jakobsen, Steinar Jakobsen, Bartal Andreassen, Ari Johanneson og Hans Martin Andreassen.

Fjórði fjalldagur: Tann 31. mars viðgjørdu vit allan seyðin við Noromectin fyri ótoy og orm og við Covexin fyri lambablóðsótt. Allur seyðurin varð vigaður og skrásettur.

18 tvílembur vórðu koyrdar oman um landsvegin. Hinar 13 vórðu koyrdar saman við einlembunum.

Manning: Ólavur av Steinum, Bartal Andreassen, Dorthea Joensen, Rólvur Djurhuus, Ari Johanneson, Andrass Holm Arge og Hans Martin Andreassen.

Lembing:

Lembingin í ár byrjaði tann 17. apríl. Ein fremmandur veðrur kom í hagan einar 3 til 4 dagar áðrenn vit sleptu veðragjólingunum út, so eftir tíðini passaði hetta rættiliga væl. Veðrið í lembingini var út av lagi vánaligt. Tað vóru fleiri dagar við útideyðaveðrið. Tað, sum hjálpti eitt sindur uppá støðuna hjá okkum, var, at tá ið tað leikaði harðast á, var um at verða avlembt. Um so var, at teir ringastu dagarnir høvdu verið, meðan lembingin var í hæddini, hevði støðan verið syndarlig.

Fimti fjalldagur:



Sunnasta (2) og miðjan (2) eru tvílembulomb.

26. mai vóru vit aftur á fjalli í Heygshaga fyri at kanna vektina á lombunum og holdið á ónum. Endamálið við at viga lombini í mai mánaði er ein liður í at fáa eina gjøgnumførda vakstrarkurvu fyri føroysk lomb. Tað er frá burðarvekt til

slátur. Vit koma at viga lombini aftur, tá várfjøllini verða gingin, aftur í august og tá skurðfjøllini verða gingin.



31. mars vigaðu ærnar 42,2 kg í miðal, 26. mai var miðal vektin hækkað við tveimum kiloum. Búnaðarstovan hevur ikki fyrr vigað ærnar og lombini hetta tíðarskeiðið, tá seyðurin verður rikin av bønum, og verður tað tí áhugavert at fylgja við, hvussu tey ymsu árini fara at roynast. Tá onki ár er at sammeta vektirnar í mai mánaði við, er áhugavert at seta spurning við, hví ærnar viga tvey kilo meir 26. mai samanborið við 31. mars. Ein orsøk er uttan iva tað ringa veðrið, vit høvdu í vetur. Tað er eisini undrunarvert, at ærnar skulu vera so mikið væl fyri í mai mánaði, tá hugsað verður um, at tær nú mjólka. Ein grund er, at tær fáa ískoytisfóður, meðan hin orsøkin kann vera, at tær ganga á bønum. Uttan iva hjálpir tað til, at holdið er so mikið gott. Tó so, ongin niðurstøða kann gerast, fyrr enn vit hava fleiri ár at sammeta við.

Sætti fjalldagur: Tann 8. juli varð farið í áseyðaroyting. Vit róku fyrst Sunnastu og Miðjuna og høvdu seyðin í hegninum niðan fyri fjósið til dagin eftir. Vóru í rætt við fyrstu gongu kl. 11.30. Síðan fóru vit avstað aftur eftir Ennisgonguni og komu í rætt kl. 15.00.

Vit royttu allar ærnar úr Ennisgonguni (Svartá og Hvilvt). Lombini vórðu markað og viðgjørd við Covexin fyri lambablóðsótt, og allur seyðurin fekk Endospec fyri orm og iglar.

Manning: Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Heri Müller, Jóhannes Arge, Ari Johannesson, Bartal Andreassen, Hallur Johannesson, Dánjal Petur Müller, Øssur Andreassen, Jón Müller, Jóna Jacobsen, Jens Ivan í Gerðinum og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess á Oyrareingjum var í samgongu.

Sjeyndi fjalldagur:

Tann 9. juli royttu og vigaðu vit allar ærnar úr Sunnastu og Miðjuni. Lombini vóru markað, vigað og viðgjørd við Covexin fyri lambablóðsótt, og allur seyðurin fekk Endospec fyri orm og iglar. Umframt tað vanliga arbeiðið, varð seyðurin vigaður og vektirnar skrásettar. Hetta hava vit gjørt fleiri ferðir seinastu árini. Úrslitið vísir, at lombini vóru betur fyri í fjør enn í ár, og eisini var lambatalið minni í 2015 enn í 2014.

Manning: Ólavur av Steinum, Bartal Andreassen, Jóhannes Arge, Andrass Holm Arge, Jón Müller, Ari Johannesson, Hallur Johannesson, Jóna Jacobsen, Jens Ivan í Gerðinum og Hans Martin Andreassen.

Sammeta vit fýra tey seinastu árini, er munurin hesin:

Ár	2012	2013	2014	2015
Dagur	3. juli	3. juli	9. juli	8. juli
Miðalvekt í kg.	20,81	19,9	24,6	22,56

Rokna vit síðan við, at dagligur vøkstur er 250 g, er munurin millum 2014 og 2015 hesin:

Ár	2014	2015
Dagur	9. juli	8. juli
Miðalvekt í kg.	24,6	22,81

Tað merkir, at lombini vigaðu 1,79 kg meira somu tíð í fjør.

Vektirnar á lombunum í áseyðaroyting:



Lombini á Hvilvt vóru fyrstu ferð vigað tann 08.07.15.

Vektirnar á tvílembulombunum:



Í Sunnastu Gongu eru 22 tvílembulomb – í Miðjuni 12 – við Svartá 6 og á Hvilvt eru 2 tvílembulomb

Afturat teimum vanligu skrásetingunum vóru blóðroyndir tiknar av lombunum, fyri á hendan hátt at kunna ala okkum burtur úr ridluskriðanum. Úrslitið av blóðroyndunum sæst í talvunum niðanfyri. Eisini bleiv helvtin av lombunum í Miðjuni og í Sunnastu roytt. Hetta er fjórða árið av fimm árum, har lomb verða roytt, fyri at fáa kunnleika um, um hetta ávirkar vektina á heystardegi.

Merki	Genotypa
15121	AA/HH/QQ
15210	AA/HH/QQ
15002	AA/RH/QQ
15017	AA/RH/QQ
15018	AA/RH/QQ
15027	AA/RH/QQ
15030	AA/RH/QQ
15145	AA/RH/QQ
15151	AA/RH/QQ
15225	AA/RH/QQ
15302	AA/RH/QQ
15323	AA/RH/QQ
15324	AA/RH/QQ
15001	AA/RR/QQ
15003	AA/RR/QQ
15004	AA/RR/QQ
15005	AA/RR/QQ
15006	AA/RR/QQ
15008	AA/RR/QQ
15012	AA/RR/QQ
15021	AA/RR/QQ
15022	AA/RR/QQ
15023	AA/RR/QQ
15024	AA/RR/QQ
15032	AA/RR/QQ
15041	AA/RR/QQ
15046	AA/RR/QQ
15105	AA/RR/QQ
15106	AA/RR/QQ
15107	AA/RR/QQ
15108	AA/RR/QQ
15111	AA/RR/QQ
15112	AA/RR/QQ
15114	AA/RR/QQ
15118	AA/RR/QQ
15119	AA/RR/QQ
15120	AA/RR/QQ
15122	AA/RR/QQ
15124	AA/RR/QQ

15157	AA/RH/QR

Merki	Genotypa
15125	AA/RR/QQ
15126	AA/RR/QQ
15129	AA/RR/QQ
15132	AA/RR/QQ
15133	AA/RR/QQ
15134	AA/RR/QQ
15138	AA/RR/QQ
15140	AA/RR/QQ
15144	AA/RR/QQ
15146	AA/RR/QQ
15148	AA/RR/QQ
15149	AA/RR/QQ
15150	AA/RR/QQ
15152	AA/RR/QQ
15154	AA/RR/QQ
15155	AA/RR/QQ
15203	AA/RR/QQ
15205	AA/RR/QQ
15211	AA/RR/QQ
15213	AA/RR/QQ
15214	AA/RR/QQ
15215	AA/RR/QQ
15216	AA/RR/QQ
15218	AA/RR/QQ
15222	AA/RR/QQ
15224	AA/RR/QQ
15228	AA/RR/QQ
15235	AA/RR/QQ
15237	AA/RR/QQ
15239	AA/RR/QQ
15240	AA/RR/QQ
15306	AA/RR/QQ
15307	AA/RR/QQ
15310	AA/RR/QQ
15311	AA/RR/QQ
15312	AA/RR/QQ
15315	AA/RR/QQ
15316	AA/RR/QQ
15317	AA/RR/QQ
15318	AA/RR/QQ
15321	AA/RR/QQ
15322	AA/RR/QQ

Merki	Genotypa
15109	AV/RH/QQ
15208	AV/RH/QQ
15226	AV/RH/QQ
15241	AV/RH/QQ
15007	AV/RR/QQ
15011	AV/RR/QQ
15014	AV/RR/QQ
15015	AV/RR/QQ
15016	AV/RR/QQ
15019	AV/RR/QQ
15020	AV/RR/QQ
15028	AV/RR/QQ
15029	AV/RR/QQ
15031	AV/RR/QQ
15036	AV/RR/QQ
15039	AV/RR/QQ
15044	AV/RR/QQ
15045	AV/RR/QQ
15048	AV/RR/QQ
15051	AV/RR/QQ
15052	AV/RR/QQ
15053	AV/RR/QQ
15101	AV/RR/QQ
15102	AV/RR/QQ
15103	AV/RR/QQ
15104	AV/RR/QQ
15110	AV/RR/QQ
15113	AV/RR/QQ
15115	AV/RR/QQ
15123	AV/RR/QQ
15127	AV/RR/QQ
15130	AV/RR/QQ
15131	AV/RR/QQ
15135	AV/RR/QQ
15136	AV/RR/QQ
15141	AV/RR/QQ
15143	AV/RR/QQ
15202	AV/RR/QQ
15204	AV/RR/QQ

Merki	Genotypa
15206	AV/RR/QQ
15212	AV/RR/QQ
15217	AV/RR/QQ
15219	AV/RR/QQ
15220	AV/RR/QQ
15221	AV/RR/QQ
15230	AV/RR/QQ
15231	AV/RR/QQ
15236	AV/RR/QQ
15238	AV/RR/QQ
15242	AV/RR/QQ
15243	AV/RR/QQ
15301	AV/RR/QQ
15304	AV/RR/QQ
15305	AV/RR/QQ
15309	AV/RR/QQ
15314	AV/RR/QQ
15319	AV/RR/QQ

Kanningar hava víst, at onkrar ílegur eru meir mótstøðuførar móti ridluskriða enn aðrar. Niðan fyri er talva, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt, sum vegleiðing um, hvørjar ílegur eru mest mótstøðuførar móti ridluskriða. Seyður er eisini í Føroyum, sum hevur VV í Codon 136. Hesin seyður er sera lítið mótstøðuførur móti ridluskriða.

Codon 136	Codon 154	Codon 171	Mótstøðuføri
AA	RR	RR	Seyður við hægst mótstøðuføri fyri ridluskriða. Sera væl egnaður til aling (at seta við).
AA	RH	RR	
AA	HH	RR	
AA	RR	QR	Seyður við høgum mótstøðuføri fyri ridluskriða. Væl egnaður til aling.
AA	RH	QR	
AA	HH	QR	
AA	RR	QQ	Seyður, ið hevur mótstøðuføri fyri ridluskriða. Kann nýtast til aling.
AA	RH	QQ	
AA	HH	QQ	
AV	RR	RR	Seyður, ið er minni mótstøðuførur fyri ridluskriða. Skal helst ikki nýtast til aling.
AV	RH	RR	
AV	HH	RR	
AV	RR	QR	
AV	RH	QR	
AV	HH	QR	
AV	RR	QQ	
AV	RH	QQ	
AV	HH	QQ	

Ærsvektirnar fram til juli 2015 vóru hesar:



Til stuttleikar kann nevnast, at miðal vøkstur á lombunum í prosent frá lembing til 26. mai, var 42%, meðan miðal vøksturin frá 26. mai til áseyðaroyting 9. juli, tað er 43 dagar, var 48%. Eisini kunnu vit nevna, at tyngsta lambið í juli ár vigaði 31,5 kg í mun til 40 kg í fjør. Tað minsta lambið í juli í ár vigaði 11,5 kg í mun til 10 kg í fjør.

Samanumtikið vóru ærnar toluliga væl fyri og høvdu hampiliga filing. Tó vildi tað ikki verið skeivt at farið á fjall nakað seinni, tá hugsað verður um filingina, men heilivágurin má eisini gevast, og í ár hava ærnar brúk fyri øllum stimbrandi eftir hendan harða veturin og ringa summarið.

Áttandi fjalldagur: Tann 21. august vóru vit á fjalli. Endamálið við hesum fjalli var bara at viga seyðin. Fóru av stað kl. 09.30. Róku fyrst Sunnastu og Miðjuna og høvdu hesar niðanfyri fjósið til hin gongan var rikin.
Róku síðan Ennisgonguna og vóru liðug kl. 19.30.

Manning: Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Dánjal Petur Müller, Heri Müller, Bjarni Jørgensen, Ari Johannesson, Øssur Andreassen, Jens Ivan í Gerðinum, Dorthea Joensen og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess á Oyrareingjum var í samgongu.

August er ikki vanlig fjalltíð, men hetta fjallið kann geva okkum svar uppá ymsar spurningar. Um vit halda áfram at viga í august, fáa vit eina mynd av, hvussu nógv lombini tyngjast seinastu vikurnar undan fletting. Tað kann vera hent at vita hjá teimum, sum fletta tíðliga at selja feskt, fyri at kunna áseta rættan søluprís. Vit máta hita og avfall á Búnaðarstovuni, og tá hesar seyðaskrásetingarnar eru gjørdar í fleiri ár, fáa vit væntandi eina greiða mynd av, hvussu nógv veðrið ávirkar vektina.

Vit skulu sjálvandi vera varin við at gera endaligar niðurstøður, inntil vit hava endurtikið skrásetingarnar í fleiri ár. Vit mugu brúka vit og skil og taka fyrivarni og taka tey fyrstu úrslitini sum ábendingar.

Niðanfyri eru nøkur lyklatøl frá vigingunum.





Atlit skal takast til, at vit ikki altíð eru á fjalli sama dag ár um ár og skulu tí uml. 250 g leggjast afturat fyri dagligan vøkstur.

Til seinast kann nevnast, at tyngsta lambið í august í fjør vigaði 56,5 kg í mun til 49 kg í ár og lættasta lambið í august í fjør vigaði 21 kg í mun til 19 kg í ár. Eisini skal viðmerkjast, at tað eru færri lomb í ár, og ávirkar hetta miðaltalið nakað.

Níggjundi fjalldagur: Tann 22. september vóru vit í skurðfjall. Róku allan hagan og viðgjørdu Sunnastu og Miðjuna. Allur seyðurin varð vigaður. Avdeyðaærnar vóru tiknar, og veðragjólingar og sleppingarlomb slept upp. Lombini, ið skuldu flettast, vóru tikin. Áseyðurin varð viðgjørdur við Combinex fyri orm. Sleppingarlombini vóru sproytað fyri garnasótt og við Covexin ímóti lambablóðsótt.

<u>Manning</u>: Ólavur av Steinum, Bartal Andreassen, Øssur Andreassen, Zakarias Jakobsen, Bjarni Jørgensen, Dánjal Petur Müller, Tróndur G. Leivsson, Jóhannes Arge, Dorthea Joensen og Hans Martin Andreassen. Heri Müller í Uppistovu í Leynum og Tummas Debess á Oyrareingjum vóru í samgongu.

<u>Tíggjundi fjalldagur:</u> Viðgjørdu Ennisgonguna 23. september. (Svartá og Hvilvt). Allur seyðurin var vigaður. Avdeyðaærnar vórðu tiknar, og veðragjólingar og sleppingarlomb slept upp. Lombini, ið skuldu flettast, vórðu tikin. Áseyðurin var viðgjørdur fyri garnasótt og við Combinex fyri orm. Sleppingarlombini vóru sproytað við Covexin ímóti lambablóðsótt.



Livandi vekt. Miðal/lamb



Samlað livandi vekt á lombum



Miðal livandi vekt á ónum

Manning: Ólavur av Steinum, Bartal Andreassen, Ari Johannesson, Dánjal Petur Müller, Jóhannes Arge, Tróndur G. Leivsson, Øssur Andreassen, Dorthea Joensen og Hans Martin Andreassen.

Sýning av veðurlombum: Í samband við, at blóðroyndir eru tiknar av lombunum fyri at staðfesta hvørjar ílegur tey hava, var ein sýning gjørd av øllum veðurlombunum, sum vóru ílegukannaði. Hetta var gjørt fyri at vita, um nakar sjónligur munur sæst á teimum, sum hava ílegurnar AA ella AV. Hetta fara vit at gera nøkur ár afturat. Úrslitið í ár vísir ikki nakran stórvegis mun millum AA og AV. Sí talvu niðanfyri.

Gen	Bein aftan	Bein framman	Horn	Ull	Heildarmynd	Stig í alt
Í alt	5,59	5,76	5,19	6,57	5,40	28,51
AA	5,54	5,86	5,60	6,60	5,86	29,46
AV	5,64	5,64	4,68	6,54	4,82	27,32

Ellinti fjalldagur: Tann 5. november róku vit Sunnastu og Miðjuna fyri at velja ær út til eina roynd, har vit kanna, hvussu geving áðrenn brundtíð ávirkar lambatal. Vit vigaðu og bólkaðu ærnar. 16 ær vórðu býttar í 4 bólkar við fýra í hvørjum bólki. Ein bólkur varð verandi inni til 7. januar. Ærnar í hesum bólki fingu turt hoyggj og seyðafóður. Ein bólkur fór í hagan og fekk einki fóður, meðan tveir bólkar fóru út á bøin. Hesir bólkarnir blivu rættaðir hvønn dag, og ærnar í øðrum bólkinum fingu seyðafóður til 9. januar, tær í hinum bólkinum fingu einki.



Miðal livandi vekt á ónum

<u>Manning:</u> Ólavur av Steinum, Dorthea Joensen, Jens Ivan í Gerðinum, Hjørdis H. Jensen og Hans Martin Andreassen.

Tólvti fjalldagur: Tann 17. desember róku vit Sunnastu og Miðjuna inn til vigingar.



Miðal vekt á ónum fyri árið 2015



Munur millum ær ið sleppingarlamb er undan og ær við ongum sleppingarlambi

Annars kann sigast, at ærnar, sum eiga sleppingarlombini, sum væntað, viga minni enn ærnar, ið ikki er slept undan. Tær eru sløk 1,5 kg lakari í november og munurin er vaksin til 3,4 kg í desember. Gjólingarnir eru ikki við í hesum yvirlitinum.

<u>Manning:</u>

Rólvur Djurhuus, Jens Ivan í Gerðinum, Jóna Jacobsen og Hans Martin Andreassen.

Sunnasta Gonga ærsvektir:

Í skanning 11. februar var miðalvektin 41,9 kg
Í medisinfjalli 31. mars var miðalvektin 40,0 kg
Í viging 26. mai var miðalvektin 44,5 kg
Í áseyðaroyting 8. juli var miðalvektin 43,6 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 50,7 kg
Í skurðfjalli 22. september var miðalvektin 53,9 kg
Í viging 5. november var miðalvektin 53,9 kg
Í viging 17. desember var miðalvektin 50,0 kg
Flett vekt á ónum var 42,5 pund

Miðjan ærsvektir:

Í skanning 19. februar var miðalvektin 44,5 kg
Í medisinfjalli 26. mars var miðalvektin 43,5 kg
Í viging 26. mai var miðalvektin 44,7 kg
Í áseyðaroyting 8. juli var miðalvektin 44,4 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 50,4 kg
Í skurðfjalli 23. september var miðalvektin 52,6 kg
Í viging 7. november var miðalvektin 52,7 kg
Í viging 15. desember var miðalvektin 51,6 kg
Flett vekt á ónum var 41,1 pund

Svartá ærsvektir:

Í skanning 11. februar var miðalvektin 43,7 kg
Í medisinfjalli 31. mars var miðalvektin 43,1 kg
Í áseyðaroyting 8. juli var miðalvektin 46,9 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 51,2 kg
Í skurðfjalli 22. september var miðalvektin 48,7 kg
Flett vekt á ónum var 41,4 pund

Hvilvt ærsvektir:

Skanning 11. februar var miðalvektin 44,6 kg
Í medisinfjalli 31. mars var miðalvektin 43,7 kg
Í áseyðaroyting 8. juli var miðalvektin 47,7 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 51,7 kg
Í skurðfjalli 22. september var miðalvektin 50,4 kg
Flett vekt á ónum var 38,0 pund

Sunnasta Gonga lambsvektir:

Við lembing var miðalvektin 4,088 kg
Í viging 26. mai var miðalvektin 10,0 kg
Í áseyðaroyting 9. juli var miðalvektin 20,7 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 32,5 kg
Í skurðfjalli 22. september var miðalvektin 37,1 kg
Flett vekt var 27,1 pund í miðal
Flett vekt í % av livandi vekt var 36,5%

Miðjan lambsvektir:

Við lembing var miðalvektin 4,379 kg
Í viging 26. mai var miðalvektin 10,6 kg
Í áseyðaroyting var miðalvektin 23,2 kg
Í viging tann 21. august var miðalvektin 34,9 kg
Í skurðfjalli var miðalvektin 40,2 kg
Flett vekt var 29,8 pund
Flett vekt í % av livandi vekt var 37,0%

Svartá lambsvektir:

Við lembing var miðalvektin 4,592 kg
Í viging 26. mai var miðalvektin 11,3 kg
Í áseyðaroyting 9. juli var miðalvektin 24,2 kg
Í viging tann 21. august var miðalvektin 37,5 kg
Í skurðfjalli 22. september var miðalvektin 40,3 kg
Flett vekt var 34,5 pund
Flett vekt í % av livandi vekt var 42,8%

Hvilvt lambsvektir:

Í áseyðaroyting 9. juli var miðalvektin 22,0 kg
Í viging 21. august var miðalvektin 34,3 kg
Í skurðfjall 22. september var miðalvektin 37,8 kg
Flett vekt var 31,4 pund
Flett vekt í % av livandi vekt var 41,6%

Tvílembulombini:

Tá ið fjallið var liðugt, vóru 18 tvílembur sleptar oman um landsvegin. Hesar fingu 600 g pr. seyð um dagin frá 31. mars til 14. apríl. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær 900 g pr. seyð um dagin.
13 tvílembur, sum gingu saman við einlembunum, fingu 370 g pr. seyð um dagin frá 31. mars til 14 apríl. Frá 14. apríl til 26. mai fingu tær 500 g pr. seyð um dagin.
Einlemburnar og tvílemburnar, ið gingu saman, fingu 26 kg pr. ær fyri alt tíðarskeiðið. Tvílemburnar, ið gingu fyri seg, fingu 40 kg pr. ær fyri alt tíðarskeiðið

Øll tvílembulombini, ið vóru dripin, høvdu eina miðalvekt á 25 pund.
Tey lombini, ið gingu saman við ónum, sum fingu meira fóður, høvdu eina miðalvekt á 25,4 pund.
Tey lombini, ið gingu saman við ónum, ið fingu minni fóður, høvdu eina miðalvekt á 24,1 pund.
Munur 1,3 pund í miðal fyri hvørt lambið. Tað vil siga 2,6 pund meira undan hvørjari ær, ið fingu meira fóður.

Til samanberingar við í fjør:

Øll tvílembulombini, ið vóru dripin, høvdu eina miðalvekt á 28,7 pund.
Tey, ið gingu saman við ónum, sum fingu meira fóður, høvdu eina miðalvekt á 30,8 pund.
Tey, ið gingu saman við hinum ónum, ið fingu minni fóður høvdu eina miðalvekt á 27,1 pund.
Munur 3,7 pund í miðal fyri hvørt lambið. Tað vil siga 7,4 pund meira undan hvørjari ær

Fletting:

Vit flettu allan seyðin á Støðini. Manningin var Bergur Lützen, Øssur Andreassen, Jóhannes Arge, Bjarni Jørgensen, Mogens Wraae, Bartal Andreassen og Mortan Andreassen.

Frá Búnaðarstovuni var Hans Martin Andreassen.

Bruttoúrtøka 2015:

28 ær eru tiknar og vigaðu íalt 1.156,0 pund
121 lomb eru tikin og vigaðu íalt 3.649,0 pund
Samlaða úrtøkan fyri **2015** var sostatt **4.805,0** pund
Eitt lamb var dripið 14 dagar gamalt til roynd í samband við ostaframleiðslu.

Til sammetingar kann nevnast, at í **2014** var bruttoúrtøkan hendan:
19 ær tiknar, sum vigaðu 775 pund
149 lomb, sum vigaðu 4.934,5 pund
Í alt **5.709,5** pund

Veðragjólingar:

Vit gjørdu 9 lomb upp til veðragjóling, eitt av teimum varð selt, harafturat høvdu vit 3 veðrar. Vit sleptu brundseyðunum út tann 27. november. Í hagan fóru 2 veðrar og 6 veðragjólingar. Ein veðragjólingur var til ærnar, ið vóru inni, og ein veðrur til ærnar á bønum, sum vóru við í royndini við fóðring.

Royndir at royta lomb í áseyðaroyting:

39 lomb vórðu roytt, og vigaðu tey 30,00 pund í miðal.
Hini 39 , ið vóru parað ímóti teimum royttu, vigaðu 30,06 pund í miðal.
Tey royttu vigaðu 30 g minni, enn tey sum ikki vóru roytt.

Smakkurin á kjøti

Føroyingar hava nýtt turt kjøt og skerpikjøt í øldir, og tað tykist, sum at undirtøkan fyri hesum forna mati er vaksandi millum fólk, og nógv verður gjørt burturúr smakkinum. Robert Joensen, sum hevur skrivað nógvar bøkur um seyð, viðgerð eisini hetta evnið. Á bls. 240 í nýggjastu bókini hjá Robert Joensen, sum Sprotin hevur givið út stendur:

Av royndum munnu føroyingar hava lært, hvussu teir skuldu fáa gott og passaliga ræst skerpikjøt. Var kalt í veðrinum, lótu menn krovini hanga inni í roykstovuni eitt ella tvey samdøgur, eftir at flett var. Tí krov, sum tornar í kulda, fær ongan smakk, tað ræstnar ikki.

Hetta, sum Robert Joensen skrivar, er eitt áhugavert uppáhald, men okkum kunnugt eru ongar nágreiniligar royndir gjørdar fyri at eftirkanna, hvussu álítandi hendan gamla vitan er. Búnaðarstovan hevur tí sett sær fyri at kanna hetta nærri, og vit hava gjørt nakrar kanningar seinastu árini.

Til hetta nýttu vit 12 veðurlambskrov av lombum, sum vóru flett sama dag. Krovini vigaðu 28 – 32 pund. Tvey krov blivu beinanvegin hongd í kølirúm við 5 hitastigum. Tvey krov blivu hongd í hjallin beinanvegin, meðan hini blivu hongd innandura í 14 hitastigum. Síðani vóru hvønn fylgjandi dag tvey krov hongd í hjallin. Bøgir og tjógv vóru skorin frá og vóru hangandi í hjallinum. Frá desember til juni vóru 8 smakkiroyndir gjørdar av kjøtinum, 4 tær fyrstu av bógvi og 4 tær seinastu av tjógvi. Dómararnir dømdu smakkin á kjøtinum og góvu stig frá 0 til 10, har 10 er best.

Fyribils úrslitið av kanningunum sæst niðanfyri:



Búnaðarstovan á Grækarismessu 2016

Hans Martin Andreassen